## TILTØK

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti, Niels Jacob Nielsen, trúboðari talar, sangur.

**Soli Deo Gloria**
Týsdagin kl. 19 Lovsangarnir møtast.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 21 Lovsangsløta á Hotel Norð.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, onki møti kl. 18.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við André Matras. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Kirkjan, Mikladalur**
Missiónsvika fyri Kalsoynna byrjar við føstuguðstænastu mikukvøldið kl. 20 við Niels Paula Danielsen. Møti verður fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og gudstænasta sunnudagin kl. 12, John Myllhamar, trúboðari talar. Missiónssangbókin verður brúkt á møtunum.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Fríggjadagin kl. 20 og leygardagin kl. 20 Fundur við Rodmundi í Liða.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur við Rodmundi í Lið.a
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18 møti við Irenu og Eyðun Christiansen.

**Møtiskrá hjá Hera Elttør, trúboðara í DK**
Leygarkvøldið 15. kl. 19.30 í Carmel í Århus.
Mánakvøldið 17. kl. 19.30 í Rønnebjerg missiónshúsi.
Hóskvøldið 20. kl. 19.30 í Viborg missiónshúsi.

**Føroyahúsið**
Musikk-kafé verður í Føroyahúsinum leygarkvøldið 15. mars kl. 20.30. Nógvur fjølbroyttur sangur verður framførdur. Eisini verður drama, musikkvideo á stórskíggja og ókeypis kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin. Kristnastova.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Opið er mánadag og mikudag frá kl. 14-17 í missiónshúsinum á Sandi. Drekkamunnur er at fáa báðar dagarnar.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 10. mars*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir.
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving o.o. spøl. Tilm. til døgurðan mikud. og páskadøg. fríggjad. tlf. 316491
**Føðingardagur og ársfundur 12. mars kl. 15. Val av tveimum tiltakslimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.**
*Týsdagin 11. mars*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Jóhann R. Jacobsen, øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 **Málprát**, J. H. W. Poulsen
*Mikudagin 12. mars*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
**kl. 14 Nevndarval – Ársfundur, føðingardagur – Tilhaldið fimm ár**
**kl. 15 Sangur, borgarstjórin vitjar, speaker corner, drekka og lagkøka**
*Hósdagin 13. mars*
kl. 10-10.30 **Fimleikur**, Sonja Danielsen
kl. 14-17 **Telduprát**, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 14. mars*
kl. 10-13 **Matgerð**, Anne Grethe Harlou
kl. 12 **Døgurði**, høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 16. mars verður ein lættur gongutúrur út á Tunguliðfjall. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæði og ein drekkamunn við. Túrurin er uml. 2 tímar. Tilmelding.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19.00-21.00 á tlf. 50 80 30.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

## HEILSANIR



Kenna til meg??? Hygg hvussu fitt eg var - nú eri eg 20 ár.



**Góði stóribeiggi**
Hjartaliga tillukku á tínum 9 ára føðingardegni.
**Heilsan lítlasystir Rannvá**



Kennir nakar hesa deiligu Babe Hon er 20 ár nú - ikki 124 :)
**Gita hvør?**



**Góði langabbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Takkf yri at tú ert so góður við okkum. Vit elska teg.
**Heilsan Tóki, Róar og Maria**



**Hey Torgunn**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 12. mars. Jú, man er cool.
**Stóra systi**



**Hey tjikkilakka, tjikkilakka bumm, bumm, bumm!**
Hjartaliga tillukku við 23 ára degnum. Alt tað besta ynskir
**Skótin í Hvannasundi :)**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



## FILMSTEIGURIN

# Insomnia

Ein ung genta er dripin í lítlu bygdini, Nightmute, í Alaska. Tá har bert er eitt lítið løgreglulið, er alneyðugt við hjálp fyri at uppklára drápsmálið. Will Dormer (Al Pacino) er veteranur í Los Angeles løgregluliðnum og ein av teimum bestu detektivunum í liðnum. Hann hevur sæð alt: Morðini, brutalitetin og korruptiónina. Hann heldur fast um veruliga málið: At fanga brotsmenninar. Hen er viðgitin í løgregluliðnum fyri evni síni at avdúka truplar sakir.

Saman við yngra starvsfelaga sínum, Hap Eckhart (Martin Donovan) kemur Dormer til Alaska fyri undir vøkru, men lítið hjartaligu, midnáttarsólini at hjálpa lokala løgregluliðnum at uppklára morðið.

Í lítla løgregluliðnum eru m.a. Ellie Burr (Hillary Swank), sum gleðir seg til at arbeiða saman við gitna Dormer. Hon er vís í, at hann kann læra hana eina rúgvu um listina í trupul uppkláringum. Dormer og Hap hava tó í felag tikið eitt nógv truplari mál við til Nightmute. Innanhýsiskanningardeildin í løgregluliðnum í Los Angeles skal fáa greiðu á lutinum hjá Dormer í einum gomlum máli, og Hap kennir á sær, at hann má siga tað, sum hann veit. Tað kann tyngja starvsfelagan. Soleiðis hevur partnaraskapið teirra millum ávísa skoynur, men Dormer letur tað ikki ganga út yvir sína yvirorðnaðu ábyrgd og professianalismu. Eitt mál skal uppklárast.

Dormer setur upp eina fellu fyri møguliga drápsmannin, men undir jagstranini eftir mistonkta, kemur hann at skjóta Hap. Eitt ólukkuligt, men hendiligt óhapp – og deyðsfall, sum Dormer, um hann sleppur undan innanhýsistrupulleikunum, er noyddur at skylda upp á jagstraða drápsmannin.

Eftirhondini strammar nótin um rithøvundanum, Walther Finch (Robin Williams), sum býr í økinum. Han hevur skrivað eina røð av kriminalskaldsøgum og hevur kent tann myrda tannáringin. Tíverri fyri Dormer hevur Finch sæð »óhappið« viðvíkjandi Hap.

Drongurin hjá gentuni er eisini ein møguligur drápsmaður, í øllum førum mistonktur, og Finch fer undir eitt vandamikið spæl – upp á lív ella deyð – við og móti Dormer. Hvat vil og kann Dormer »gjalda« fyri at Finch skal dekka út yvir mistak hansara?

Á síðulinjuni rbeiðir Ellie íðin víðari við sínum ambitiónum og kanningunum fyri at vísa Dormer og heiminum, at hon er ein góður løgreglumaður.

Plágaður av moralskum hugsanum og tyngdur av svøvnloysi í einum øki, har náttarmyrkrið ongantíð hylur, skal Dormer finna ein útveg, sum meira og meira líkist einum blindvegi…



# About Schmidt

Warren Schmidt stendur á einum vegamóti í lívinum – so ella so. Fyri tað fyrsta hevur hann sagt lívslanga starv sítt sum aktuarur í einum tryggingarfelag frá sær, fyri tað næsta er dóttir hansara, Jeannie, við at giftast einum verri klovni – og so er tað konan Warren kennir seg av álvara einsamallan.

Uttan arbeiði, konu og familju ger Warren av at finna meiningina við trista lívi sínum. Hann setir seg handan rættið í nýggja campara sínum – sum hann hevði ætlað at koyrt landið upp á kryss og tvers saman við Helen við – og setir kós móti Denver.

Málið hjá Warren er at koma fram til tíðina, áðrenn Jeanny verður gift, so hann kann hjálpa henni við brúdleypsfyrireikingunum – og harvið vónandi rætta upp á tað heldur skirvisliga forholdið. Men tíverri hatar Warren sín framtíðar verson, Randall – ein keðiligan, lágløntan seljara – við góðum hjarta. Og fyri at gera tað enn verri er Warren absalutt heldur ikki serliga fegin um verfamiljuna hjá dóttrini.

Spakuliga verður Warren sannførdur um, at nýggja mál hansara er, at hann fyri alt í verðini má forða fyri, at Jeannie verður gift Randall.

Ávegis undir síni svarthumoristisku og psykiskt pínufullu ferð skiftir hann tankar sínar – í brævaformi – við vin sín, tann seks ára gamla, foreldraleysa tansnianska dreingin, Ndugu Umbo, sum Warren er sponsor hjá.

Gjøgnum hesi longu brøv fær Warren spakuliga sett orð á tankar sínar og harvið møguleika at hugsa um støðu sína og lív sítt…


TILNEVNDUR 2 OSCARS




**Frumsýning**
Fríggjadagin 14.03. kl. $20^{30}$ Leygardagin 15.03. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 16.03. kl. $19^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




**Frumsýning**
Fríggjadagin 14.03. kl. $23^{00}$ Leygardagin 15.03. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 16.03. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 14.03. kl. $18^{00}$ Fríggjadagin 14.03. kl. $21^{00}$
Leygardagin 15.03. kl. $18^{00}$ Leygardagin 15.03. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 16.03. kl. $21^{30}$




Fríggjadagin 14.03. kl. $24^{00}$ Leygardagin 15.03. kl. $24^{00}$
Sunnudagin 16.03. kl. $19^{00}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 14.03. kl. $17^{30}$ Leygardagin 15.03. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 16.03. kl. $17^{30}$